# Frá Luftwaffe til Manch

## Eingin lagna hjá nøkrum Manchester City spælara er so serstøk, sum tann hjá týskaranum Bert Trautmann, sum kom til Onglands sum ein fíggindi, men sum við tíðini gjørdist ein væl dámdur fótbóltsspælari og hetja

### Bert Trautman

Heri Simonsen
heris@sosialurin.fo

EB/Streymur og Føroyar fáa fína vitjan í næstum. Millum tær fínastu vit hava havt innan fótbólt nakrantíð. Mong gleða seg til 17. juli, tá Manchester City og EB/Streymur fara á vøllin, og fara mong City-viðhaldsfólk at seta dám á býin. Í tíðini fram til dystin fer undirritaði at rógva aftur á partar av søguni hjá Manchester City. Tann mest serstaka søgan, tá um Manchester City ræður, er um ein týskan málmann.

### Fallskermshermaður

Bernhard Carl Trautmann er føddur í Bremen í Norður-Týsklandi hin 22. oktober í 1923, og fyllir hann sostatt 85 ár í heyst. Sum óteljandi aðrir týskir dreingir var Trautmann limur í "Hitler Jugend", og sum allir aðrir ungir, frískir menn, so noyddist Trautmann at fara upp í týska herin undir seinna veraldarbardaga. Í 1941 meldaði hann seg uppí týska flogvápnið, Luftwaffe, sum radiooperatørur, men tað vísti seg skjótt, at hann var ikki so væl egnaður sum radiooperatørur, so hann var fluttur til herdeildina í Spandau, og har gjørdist Trautmann ein partur av fallskermsherliðnum.

Fyrstu árini hevði hann hertænastu í tí hertikna Póllandi, men tað var langt frá hermótinum. Av tí, at hann og felagarnir keddu seg, so framdu teir nógvar beistagerðir, fyri hetta fekk hann eina disiplinera fongulsrevsing. Trautmann mátti inn at sita í 3 mánaðir. Men í 1942 slapp hann út aftur, og tá var hann saman við herdeild sínari sendur at stríðast við tann talsterka Reyða Herin hjá Sovjetsamveldinum. Á einum sinni var Trautmann fangaður av Reyða Herinum, men á undrunnarverdan hátt eydnaðist tað honum at sleppa til rýmingar. Tá herdeildin var tikin aftur av hermótinum, vóru bert 300 mans á lívi, herdeildin hevði upprunaliga talt 1.000 mans. Trautmann vann 5 hernaðarlig heiðursmerki á eystara hermótinum, har ímillum tað fínasta, ein týskan jarnkross av fyrsta flokki.

### Til Normandíið

Trautmann var settur upp í tign í týska herinum, fyrst gjørdist hann korporalur, og eftir tað sersjantur. Í 1944 var hann fluttur til franska Normandíið fyri at verja upp ímóti einari innrás hjá teimum sameindu. Men aftaná nógv hørð stríð, álop og bumbuálop frá teimum sameindu, var Trautmann ein av teimum fáu í sínari deild, sum enn var á lívi. Hann tók tá avgerðina at fara til heimbýin Bremen, men við stórum vága. Allir týskir hermenn, sum ikki høvdu nakað samleikaprógv uppi á sær, vóru skotnir sum dessertørar. Tað bleiv nú eitt stríð hjá Trautmann at sleppa undan hermonnum á báðum síðum. Hann bleiv fangaður av fronskum mótstøðudeildum, men aftur slapp Trautmann til rýmingar. Men tá nakrir dagar vóru farnir var hann fangaður av amerikonskum hermonnum. Hann óttaðist fyri, at teir fóru at taka hann av døgum, men teir førdu hann til eina bretska herdeild, har



*Týskarin Bert Trautmann varð fangaður av bretska herinum undir seinna veraldarbardaga, men endaði sum fótbóltshejta í Manchester City. Her spælir hann FA Cup finalu ímóti Newcastle í 1955*

*Mynd: Polfoto*

bretarnir bert søgdu við hann:

– Hello Fritz, fancy a cup of tea?

Hann var førdur til Northwich, sum liggur uttanfyri Manchester, og har sat hann krígsfangi fyrstu árini, eftir hetta var hann førdur til eina krígsfangalegu í Ashton-in-Makerfield, sum liggur nær við Wigan. Mennirnir spældu nógv fótbólt í krígsfangaleguni, og spældi Trautmann sum centre-half í byrjanini. Hann fekk ein skaða undir einum dysti, og spurdi um hann kundi sleppa í mál, og har var hann standandi. Í 1948 var hann latin leysur, og arbeiddi hann á einum bóndagarði, og fekst hann eisini við at avmontera bumbur í Liverpool. Sesongina 1948-1949 var hann málmaður hjá amatørliðnum úr Liverpool, sum nevnist Saint Helens Town. Her gjørdist hann góður við dóttir skrivara felagsins, og giftust tey seinni. Tað eydnaðist Trautmann og liðið hansara at koma í lokalu steypakappingina fyri amatørlið á vári í 1949, og vóru 9.000 áskoðarar til finaluna. Trautmann hevði víst høgt støðið hetta kappingarárið, og tað skuldi beina honum veg til nakað enn størri.

### Nógv mótmæli

Í upphitingini til kappingarárið 1949-1950 spældi St. Helen ein vinardyst ímóti Manchester City, og var tað í hesum dystinum, at teir í City fingu eyguni upp fyri týska málverjanum. 7. oktober 1949 skrivaði Bert Trautmann undir ein sáttmála við Manchester City, fyrst sum amatørur, men stutt eftir hetta, sum ein heiltíðar yrkisspælari. Hetta fall ikki í góða jørð hjá City-viðhaldsfólkunum, sum vóru alt annað enn fegin at hava ein fyrrverandi lim í týska Luftwaffe á sínum liði. Trúgvir áskoðarar, sum